Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

# Fótbóltsfelagið B36

**Gundadalur, Postboks 1136, FO-100 Tórshavn**

## Ársfrásøgn

## 1. januar - 31. desember 2019

| FRUMRIT |
|---|

Ársfrásøgnin er løgd fram og góðkend á felagsins ársaðalfundi, tann

____________________________

Fundarstjóri

## Innihaldsyvirlit


| | Síða |
|---|---|
| **Átekningar** | |
| Leiðsluátekning | 1 |
| Átekning frá óheftum grannskoðara | 2 |
| **Leiðslufrágreiðing** | |
| Upplýsingar um felagið | 5 |
| Leiðslufrágreiðing | 6 |
| **Ársroknskapur 1. januar - 31. desember 2019** | |
| Nýttur roknskaparháttur | 7 |
| Rakstrarroknskapur | 10 |
| Fíggjarstøða | 11 |
| Pengastreymsuppgerð | 13 |
| Notur | 14 |

## Leiðsluátekning

Nevndin hevur í dag lagt fram ársfrásøgnina fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2019 hjá Fótbóltsfelagið B36.

Ársfrásøgnin er gjørd í samsvari við ársroknskaparlógina og ásetingum í "Faroe Islands Football Association Club Licensing Regulations, edition 2019.

Tað er okkara fatan, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi, og at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum og fíggjarligu støðu pr. 31. desember 2019 hjá felagnum og av úrslitinum av virkseminum og pengastreymunum hjá felagnum fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2019.

Leiðslufrágreiðingin inniheldur, eftir okkara fatan, eina rættvísandi frágreiðing um tey viðurskifti, sum frágreiðingin umrøður.

Ársfrásøgnin verður løgd fyri ársaðalfundin við tilmæli um góðkenning.

Tórshavn, tann 31. januar 2020

**Nevnd**

| | | |
|---|---|---|
| Jákup Mørk<br>nevndarformaður | Sámal Imundarsson<br>næstformaður | Rolf Herup Olsen<br>kassameistari |
| Símun Grønadal<br>nevndarlimur | Jákup Lamhauge<br>nevndarlimur | Steinbjørn Hardlei<br>nevndarlimur |
| Anja Weyhe<br>nevndarlimur | Ronnie Thomassen<br>umboð fyri ungdómsdeildina | |

## Átekning frá óheftum grannskoðara

**Til nevndina í Fótbóltsfelagið B36**

**Niðurstøða**

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Fótbóltsfelagið B36 fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2019 við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu, pengastreymsuppgerð og notum. Ársroknskapurin er gjørdur eftir ársroknskaparlógini og ásetingum í "Faroe Islands Football Association Club Licensing Regulations, edition 2019".

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum og fíggjarligu støðuni pr. 31. desember 2019 hjá felagnum og av úrslitinum av virkseminum og pengastreymunum hjá felagnum í roknskaparárinum 1. januar - 31. desember 2019 samsvarandi ársroknskaparlógini.

**Grundarlag fyri niðurstøðuni**

Grannskoðanin er løgd til rættis í samsvari við altjóða standardir um grannskoðan og aðrar ásetingar, sum eru galdandi í Føroyum. Okkara ábyrgd eftir hesum standardum og ásetingum er nærri greidd frá í niðanfyri standandi broti "Ábyrgd grannskoðarans av at grannskoða ársroknskapin". Vit eru óheft av felagnum samsvarandi altjóða etisku krøvunum fyri grannskoðarar (etisku reglunum hjá IESBA) og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, og vit hava hildið okkara etisku skyldur, sum ásettar eru í hesum standardum og krøvum. Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kunnu vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

**Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum**

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við ársroknskaparlógina og ásetingum í "Faroe Islands Football Association Club Licensing Regulations, edition 2019". Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av tí innanhýsis eftirliti, ið leiðslan metir skal til, fyri at ársroknskapurin kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

Tá ársroknskapurin verður gjørdur, hevur leiðslan ábyrgdina av at meta, um felagið megnar at halda fram við rakstrinum; at upplýsa um viðurskifti viðvíkjandi framhaldandi rakstri, har tað er viðkomandi; umframt at gera ársroknskapin eftir roknskaparmeginregluni um framhaldandi rakstur, uttan so at leiðslan hevur í hyggju at avtaka felagið, steðga rakstrinum, ella at leiðslan í roynd og veru ikki hevur annan møguleika enn at gera tað.

**Ábyrgd grannskoðarans av at grannskoða ársroknskapin**

Okkara endamál er at fáa grundaða vissu fyri, at ársroknskapurin í síni heild ikki hevur týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, og at geva eina grannskoðanarátekning við eini niðurstøðu. Grundað vissa er vissa á høgum stigi, men er ikki full trygd fyri, at ein grannskoðan, sum er gjørd eftir ásetingunum í altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, altíð kann avdúka týðandi skeivleikar, tá slíkir eru. Skeivleikar kunnu koma fyri orsakað av sviki ella mistøkum og kunnu metast at vera týðandi, um tað kann væntast, at teir hvør sær ella saman ávirka fíggjarligu avgerðirnar, sum roknskaparbrúkararnir taka við støði í ársroknskapinum.

## Átekning frá óheftum grannskoðara

Sum ein liður í grannskoðanini, ið verður gjørd eftir altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, gera vit yrkisligar metingar og hava eitt yrkisligt ivingarsemi undir grannskoðanini. Har vit eisini:

- Eyðmerkja og meta um váðan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, leggja til rættis og gera tey grannskoðanararbeiðir, sum hesir váðar krevja, umframt fáa til vega tey grannskoðanarprógv, sum eru nøktandi at vera grundarlag undir okkara niðurstøðu. Váðin fyri ikki at varnast týðandi skeivleikar, sum standast av sviki, er størri, enn tá talan er um týðandi skeivleikar, sum standast av mistøkum, tí svik kann vera av samanløgdum ráðum, skjalafalsan, tilætlaðari burturúrlegging, villleiðingum ella við at skúgva innanhýsis eftirlitið til viks.

- Fáa eina fatan av innanhýsis eftirlitinum, sum er viðkomandi fyri grannskoðanina, fyri at kunna leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum, men ikki fyri at kunna gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum.

- Taka støðu til um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, og um tær roknskaparligu metingarnar og tilhoyrandi upplýsingar, sum leiðslan hevur gjørt eru rímiligar.

- Gera niðurstøðu um, hvørt tað er hóskandi, at leiðslan hevur gjørt ársroknskapin við støði í roknskaparmeginregluni um framhaldandi rakstur, umframt um tað við støði í teimum grannskoðanarprógvum, sum eru fingin til vega, er týðandi óvissa um hendingar og viðurskifti, sum kunnu viðføra týðandi iva, um felagið megnar at halda fram við rakstrinum. Um okkara niðurstøða er, at tað er ein týðandi óvissa, skulu vit í okkara grannskoðanarátekning vísa á upplýsingar um hesi viðurskifti í ársroknskapinum ella, um hesar upplýsingar ikki eru nøktandi, tillaga okkara niðurstøðu. Okkara niðurstøður byggja á tey grannskoðanarprógv, sum vit hava fingið fram til dagfestingina á okkara grannskoðanarátekning. Hendingar og viðurskifti í framtíðini kunnu tó føra við sær, at felagið ikki longur megnar at halda fram við rakstrinum.

- Meta um samlaðu framløguna, bygnaðin og innihaldið í ársroknskapinum, herundir upplýsingarnar í notunum, umframt um ársroknskapurin vísir tey undirliggjandi handilsviðurskifti og hendingar á ein slíkan hátt, at tað gevur eina rættvísandi mynd av hesum.

Vit samskifta við ovastu leiðsluna um millum annað vavið á ætlaðu grannskoðanini, og nær grannskoðað verður, og eisini um týðandi eygleiðingar, herundir um møguligar týðandi manglar í innanhýsis eftirlitinum, sum vit eyðmerkja undir grannskoðanini.

**Ummæli av leiðslufrágreiðingini**

Leiðslan hevur ábyrgdina av leiðslufrágreiðingini.

Okkara niðurstøða um ársroknskapin fevnir ikki um leiðslufrágreiðingina, og vit geva onga váttan við vissu um leiðslufrágreiðingina.

## Átekning frá óheftum grannskoðara

Í sambandi við okkara grannskoðan av ársroknskapinum er tað okkara ábyrgd at lesa leiðslufrágreiðingina og í hesum sambandi at umhugsa um leiðslufrágreiðingin er í týðandi ósamsvari við ársroknskapin ella ta vitan, ið vit hava fingið undir grannskoðanini, ella á annan hátt tykist at hava týðandi skeivleikar.

Okkara ábyrgd er eisini at umhugsa um kravdu upplýsingarnar eftir ársroknskaparlógini eru umrøddar í leiðslufrágreiðingini.

Við støði í gjørda arbeiðinum er tað okkara fatan, at leiðslufrágreiðingin er í samsvari við ársroknskapin, og at hon er gjørd í samsvari við ásetingarnar í ársroknskaparlógini og ásetingum í "Faroe Islands Football Association Club Licensing Regulations, edition 2019". Vit eru ikki vorðin varug við týðandi skeivleikar í leiðslufrágreiðingini.

Tórshavn, tann 31. januar 2020

**P/F Januar**
løggilt grannskoðanarvirki

Hans Laksá
statsaut. revisor

## Upplýsingar um felagið

| | | |
|---|---|---|
| **Felagið** | Fótbóltsfelagið B36<br>Gundadalur<br>Postboks 1136<br>FO-100 Tórshavn | |
| | Telefon: | 311936 |
| | Telefax: | 318036 |
| | Heimasíða: | www.b36.fo |
| | Skr.nr.: | |
| | V-tal: | 345377 |
| | Roknskaparár: | 1. januar - 31. desember |
| **Nevnd** | Jákup Mørk, nevndarformaður<br>Sámal Ímundarsson, næstformaður<br>Rolf Herup Olsen, kassameistari<br>Símun Grønadal, nevndarlimur<br>Jákup Lamhauge, nevndarlimur<br>Steinbjørn Hardlei, nevndarlimur<br>Anja Weyhe, nevndarlimur<br>Ronnie Thomassen, umboð fyri ungdómsdeildina | |
| **Grannskoðan** | **P/F Januar, løggilt grannskoðanarvirki**<br>Óðinshædd 13, Postbox 30, FO-110 Tórshavn<br>Telefon: 31 47 00 - Telefaks: 35 17 01<br>Teldupostur: januar@januar.fo<br>Heimasíða: www.januar.fo | |

## Leiðslufrágreiðing

**Virksemi felagsins**

Virksemið hjá fótbóltsfelagnum B36 fevnir um fótbólt millum bæði ung og vaksin.

**Úrslitið**

Roknskapurin fyri 2019 vísir eitt hall uppá 161 t.kr. Nevndin er ikki nøgd við úrslitið.

Hóast felagið aftur í 2019 fekk inntøkur frá altjóða luttøku, er talan um hall. Tað er eitt støðugt mál hjá nevndini, at raksturin í felagnum ikki skal vera treytaður av altjóða luttøku, og tí er alneyðugt at hava yvirskot í rakstrinum, tey ár, tá europiskur fótbóltur verður spældur.

Ítróttaliga gekk 2019 væl hjá besta mansliðnum. Liðið gjørdist nummar tvey í Betri-deildini, har vit fram til seinasta leikdag vóru við í kappingini um gullið. Hetta merkir eisini, at 2020 er sjeynda árið á rað, at B36 tekur lut í europiskari kapping.

Besta kvinnulið felagsins hevur seinastu 2-3 árini verið í eini skiftistíð, har nógvir nýggir spælarar eru settir við. Leikliga framgongdin hevur verið stór, og vit ivast ikki í, at framgongdin fer at geva góð ítróttalig úrslit í komandi tíðum.

Seinnu árini hava vit lagt stóran dent á, at hart tiltrongdar ábøtur hava verið gjørdar á felagshúsið, sum er karmurin um virksemið hjá B36. Tað er framhaldandi ætlanin, at stórt arbeiði verður lagt í hetta.

**Fíggjarstøðan**

Eginpeningurin hjá felagnum er við árslok 2019 4.455 t.kr.

**Framtíðarútlit**

Úrslitið fyri 2019 vísir, at tað er neyðugt við støðugum tillagingum í rakstrinum. Nevndin hevur sum mál, at hesar tillagingar í minst møguligan mun raka stóra ungdómsarbeiðið í felagnum. Ein málsetningur er, at B36 í størri mun skal uppala egnar møguleikar til manning á bestu liðum felagsins, og sær nevndin hetta sum einastu gongdu leið fyri eini sterkari ítróttaligari støðu, sum samstundis er burðardygg.

## Nýttur roknskaparháttur

Ársfrásøgnin fyri Fótbóltsfelagið B36 er gjørd í samsvari við ásetingarnar í ársroknskaparlógini fyri feløg í flokki B. Harumframt hevur felagið valt at fylgja ásetigum í "Faroe Islands Football Association Club Licensing Regulations, edition 2019."

Ársfrásøgnin er gjørd eftir sama roknskaparhátti sum undanfarna ár og verður gjørd í donskum krónum (DKK).

**Alment um innrokning og virðisáseting**

Í rakstrarroknskapinum verða inntøkur innroknaðar, so hvørt tær verða vunnar. Sama er galdandi fyri virðisjavningar av fíggjarligum ognum og skyldum. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis allir kostnaðir innroknaðir, herímillum avskrivingar, niðurskrivingar, avsettar skyldur og afturføringar, sum standast av broyttum roknskaparligum metingum av upphæddum, ið áður hava verið innroknaðar í rakstrarroknskapinum.

Ognir verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini geva felagnum fíggjarligar fyrimunir, og virðið á ognini kann ásetast álítandi.

Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini taka fíggjarligar fyrimunir úr felagnum, og virðið á skylduni kann ásetast álítandi.

Við fyrstu innrokning verða ognir og skyldur virðisásettar til útveganarvirði. Síðani verða ognir og skyldur virðisásettar, sum greitt er frá niðanfyri um einstøku roknskaparpostarnar.

Við innrokning og virðisáseting verður atlit tikið at væntaðum tapi og váða, ið vísa seg, áðrenn ársfrásøgnin er liðug, og sum viðvíkja viðurskiftum, sum vóru til staðar við roknskaparlok.

## Rakstrarroknskapurin

**Nettosøla**

Nettosøla verður innroknað í rakstrarroknskapin, um veiting og váði eru farin til keypara innan roknskaparlok, og inntøkan er álítandi uppgjørd og væntast at koma inn. Nettosølan verður innroknað uttan meirvirðisgjald, avgjøld og við avsláttri í sambandi við søluna frádrignum.

**Aðrar rakstrarinntøkur**

Aðrar rakstrarinntøkur umfata roknskaparpostar, sum hava minni týdning í mun til høvuðsvirksemið hjá felagnum, herímillum vinning og tap við sølu av immateriellari og materiellari støðisogn.

**Aðrir uttanhýsis kostnaðir**

Aðrir uttanhýsis kostnaðir umfata kostnaðir til sølu, marknaðarføring, fyrisiting, hølir, tap av áognarum og operationellar leasingkostnaðir.

## Nýttur roknskaparháttur

**Starvsfólkakostnaðir**

Starvsfólkakostnaðir umfata løn íroknað frítíðarløn og eftirløn umframt onnur sosial gjøld. Í starvsfólkakostnaðum vera móttikin endurgjøld frá almennum myndugleikum trekt frá.

**Av- og niðurskrivingar**

Av- og niðurskrivingar umfata av- og niðurskrivingar í árinum av immateriellari og materiellari støðisogn.

**Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir**

Fíggjarligir postar umfata rentur. Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir verða innroknað í rakstrarroknskapin við teimum upphæddum, sum viðvíkja regnskabsåret.

**Skattur av ársúrslitinum**

Skattur í árinum, ið er partafelagsskatturin fyri árið og broytingin í útsettum skatti, verður innroknaður í rakstrarroknskapinum við tí parti, sum viðvíkur ársúrslitinum. Skattur viðvíkjandi møguligum bókingum beinleiðis á eginognina, verður bókaður á eginognina.

## Fíggjarstøðan

**Materiell støðisogn**

Grundøki og bygningar verða virðisásett til útveganarvirði, við uppskrivingum løgdum afturat og frádrigið samlaðar avskrivingar og niðurskrivingar. Grundøki verða ikki avskrivað.

Avskrivingargrundarlagið er kostprísur við uppskrivingum til dagsvirði løgdum afturat, og frádrigið møguligt væntað restvirði eftir lokna brúkstíð.

Onnur materiell støðisogn verður virðisásett til útveganarvirði, frádrigið samlaðar avskrivingar og niður-skrivingar.

Avskrivingargrundarlagið er kostprísur frádrigið møguligt væntað restvirði eftir lokna brúkstíð.

Útveganarvirðið umfatar keypsprísin og kostnaðir, ið beinleiðis er knýttir at útveganini, til ognin er klár at taka í nýtslu.

Jøvn avskriving verður framd grundað á niðanfyristandandi meting av væntaðu brúkstíðunum og rest-virðunum hjá ognunum:

| | Brúkstíð | Restvirði |
|---|---|---|
| Bygningar | 20-30 ár ár | 20 % |
| Onnur tól, rakstrargøgn og innbúgv | 3-5 ár | 0-20 % |

Smáamboð við eini væntaðari livitíð á undir 1 ár verða útreiðsluførd í útveganarárinum.

## Nýttur roknskaparháttur

### Áogn

Áogn verður virðisásett til amortiserað útveganarvirði, sum vanliga svarar til áljóðandi virði. Fyri at standa ímóti møguligum tapi verður niðurskrivað til nettorealisatiónsvirðið.

### Tíðaravmarkingar

Tíðaravmarkingar, sum eru innroknaðar undir ogn, umfata staðfestar kostnaðir, sum viðvíkja komandi roknskaparárið.

### Tøkur peningur

Tøkur peningur umfatar innistandandi í peningastovnum og reiðan pening.

### Skuld

Onnur skuld verður tikin við til amortiserað útveganarvirði, sum vanliga er áljóðandi virðið.

### Tíðaravmarkingar

Tíðaravmarkingar, sum eru innroknaðar undir skuld, umfata inngjøld, sum viðvíkja inntøkum komandi ár.

## Pengastreymsuppgerð

Pengastreymsuppgerðin vísir pengastreymarnar hjá felagnum frá rakstri, íløgum og fígging fyri roknskaparárið, broytingar í tøkum peningi umframt tøkan pening við roknskaparbyrjan og roknskaparlok.

### Pengastreymar frá rakstri

Pengastreymar frá rakstri verða gjørdir upp sum ársúrslit javnað fyri ikki kontantar rakstrarpostar, broyting í rakstrarfígging og goldnan partafelagsskatt.

### Pengastreymar frá íløgum

Pengastreymar frá íløgum umfata gjøld í keyp og sølu av støðisogn.

### Pengastreymar frá fígging

Pengastreymar frá fígging umfata broytingar í støðd ella samanseting av felagskapitali og kostnaðir í hesum sambandi. Harumframt umfata pengastreymarnir lántøku, avdráttir av rentuberandi skuld og útgoldið vinningsbýti til eigararnar.

### Tøkur peningur

Tøkur peningur umfatar tøkan pening umframt stuttfreistað virðisbrøv, ið lætt kunnu umbýtast við tøkan pening, og har tað er ótýðandi váði fyri virðisbroytingum.

## Rakstrarroknskapur 1. januar - 31. desember

| Nota | | 2019 kr. | 2018 kr. |
|---|---|---|---|
| 1 | Inntøkur | 5.594.579 | 9.852.754 |
| | Aðrar rakstrarinntøkur | 1.546.493 | 1.257.975 |
| 2-3 | Aðrir uttanhýsis kostnaðir | -4.058.448 | -5.772.027 |
| | **Bruttoúrslit** | **3.082.624** | **5.338.702** |
| 4 | Starvsfólkakostnaðir | -3.115.606 | -3.373.963 |
| | Av- og niðurskrivingar av materiellari støðisogn | -92.461 | -68.252 |
| | **Rakstrarúrslit** | **-125.443** | **1.896.487** |
| | Aðrar fíggjarligar inntøkur | 121 | 245 |
| 5 | Aðrir fíggjarligir kostnaðir | -35.604 | -48.085 |
| | **Úrslit áðrenn skatt** | **-160.926** | **1.848.647** |
| | Skattur av ársúrsliti | 0 | 0 |
| | **Ársúrslit** | **-160.926** | **1.848.647** |

**Uppskot til býti av úrsliti:**

| | 2019 kr. | 2018 kr. |
|---|---|---|
| Flytast til flutt úrslit | 0 | 1.848.647 |
| Flutt frá fluttum úrsliti | -160.926 | 0 |
| **Býtt tilsamans** | **-160.926** | **1.848.647** |

## Fíggjarstøða 31. desember

### OGN

| Nota | | 2019 kr. | 2018 kr. |
|---|---|---|---|
| | **Støðisogn** | | |
| 6 | Grundøki og bygningar | 2.913.692 | 2.769.163 |
| 6 | Annar útbúnaður, rakstrargøgn og innbúgv | 130.232 | 77.506 |
| | Materiell støðisogn tilsamans | 3.043.924 | 2.846.669 |
| | Depositum | 8.500 | 6.500 |
| | Fíggjarlig støðisogn tilsamans | 8.500 | 6.500 |
| | **Støðisogn tilsamans** | **3.052.424** | **2.853.169** |
| | **Ogn í umferð** | | |
| | Vøru- og tænastuáogn | 811.601 | 385.542 |
| | Onnur áogn | 640.151 | 58.853 |
| | Áogn frá leikaraflytingum | 0 | 0 |
| | Áogn hjá samtakseindum og øðrum nærstandandi pørtum | 0 | 0 |
| | Áogn tilsamans | 1.451.752 | 444.395 |
| | Tøkur peningur | 2.139.577 | 3.166.663 |
| | **Ogn í umferð tilsamans** | **3.591.329** | **3.611.058** |
| | **OGN TILSAMANS** | **6.643.753** | **6.464.227** |

## Fíggjarstøða 31. desember

### SKYLDUR

| Nota | | 2019 kr. | 2018 kr. |
|---|---|---|---|
| | **Eginogn** | | |
| 7 | Flutt úrslit | 4.454.972 | 4.615.897 |
| | **Eginogn tilsamans** | **4.454.972** | **4.615.897** |
| | **Skuld** | | |
| | Onnur skuld | 59.131 | 336.665 |
| | Langfreistað skuld tilsamans | 59.131 | 336.665 |
| | Stuttfreistaður partur av langfreistaðari skuld | 300.000 | 300.000 |
| | Vøru- og tænastuskuld | 1.037.562 | 325.445 |
| | Skuld til samtakseindir ellar aðrar nærstandandi partar | 792.088 | 802.353 |
| 8 | Onnur skuld | 0 | 79.637 |
| | Skuld til sosialar- og skattamyndugleikar | 0 | 4.230 |
| | Stuttfreistað skuld tilsamans | 2.129.650 | 1.511.665 |
| | **Skuld tilsamans** | **2.188.781** | **1.848.330** |
| | **SKYLDUR TILSAMANS** | **6.643.753** | **6.464.227** |

**9 Veðsetingar og trygdarveitingar**

## Pengastreymsuppgerð 1. januar - 31. desember

| Nota | | 2019 kr. | 2018 kr. |
|---|---|---|---|
| | Ársúrslit | -160.926 | 1.848.647 |
| 10 | Javningar | 127.944 | 116.092 |
| 11 | Broyting í rakstrarpeningi | -391.373 | -242.917 |
| | Pengastreymar frá rakstri áðrenn fíggjarligar postar | -424.355 | 1.721.822 |
| | Rentuinngjaldingar og líknandi | 123 | 245 |
| | Rentuútgjaldingar og líknandi | -35.604 | -48.085 |
| | Pengastreymar frá vanligum rakstri | -459.836 | 1.673.982 |
| | **Pengastreymar frá rakstri** | **-459.836** | **1.673.982** |
| | Keyp av materiellari støðisogn | -289.716 | -230.813 |
| | **Pengastreymar frá íløgum** | **-289.716** | **-230.813** |
| | Avdráttir av langfreistaðari skuld | -277.534 | -261.796 |
| | **Pengastreymar frá fígging** | **-277.534** | **-261.796** |
| | **Broyting í tøkum peningi** | **-1.027.086** | **1.181.373** |
| | Tøkur peningur primo | 3.166.663 | 1.985.290 |
| | **Tøkur peningur** | **2.139.577** | **3.166.663** |

| | | | |
|---|---|---|---|
| | **Tøkur peningur** | | |
| | Tøkur peningur | 2.139.577 | 3.166.663 |
| | **Tøkur peningur** | **2.139.577** | **3.166.663** |

## Notur

| | | 2019<br>kr. | 2018<br>kr. |
|---|---|---|---|
| **1.** | **Inntøkur** | | |
| | Heimligu kappingarnar | 730.819 | 505.160 |
| | UEFA-kapping | 32.410 | 152.500 |
| | Atgongumerkjasøla - limagjald | 410.438 | 386.361 |
| | **Atgongumerkjasøla tilsamans** | 1.173.667 | 1.044.021 |
| | | | |
| | Høvuðsstuðul | 120.000 | 150.000 |
| | Leikvallarstuðul | 709.119 | 706.655 |
| | Lýsingar við vøllin | 188.400 | 195.250 |
| | Aðrar inntøkur | 3.500 | 0 |
| | Aðrar rakstrarinntøkur | 172.969 | 0 |
| | **Stuðulsavtalur og lýsingar tilsamans** | 1.193.988 | 1.051.905 |
| | | | |
| | Heimligu kappingarnar | 1.101.326 | 1.589.966 |
| | **Handil (søla, tiltøk vm.) tilsamans** | 1.101.326 | 1.589.966 |
| | | | |
| | Kringvarpsrættindi | 48.424 | 717.255 |
| | **Kringvarpsrættindi tilsamans** | 48.424 | 717.255 |
| | | | |
| | UEFA solidatitetur og vinningur frá kappingum | 2.077.174 | 5.449.607 |
| | UEFA solidaritetur og vinningur frá kappingum tilsamans | 2.077.174 | 5.449.607 |
| | | | |
| | | **5.594.579** | **9.852.754** |

## Notur

| | 2019 kr. | 2018 kr. |
|---|---|---|
| **2. Aðrir uttanhýsis kostnaðir** | | |
| Aðrir rakstrarkostnaðir, sí notu 4 | 4.058.448 | 5.772.027 |
| | **4.058.448** | **5.772.027** |

| | 2019 kr. | 2018 kr. |
|---|---|---|
| **3. Aðrir rakstrarkostnaðir** | | |
| Útreiðslur á leikdegi | 2.037.187 | 2.948.622 |
| Útreiðslur til stuðlar og lýsingar | 87.604 | 168.631 |
| Útreiðslur til handil | 67.921 | 70.837 |
| Útreiðslur av materiellum ognum | 857.168 | 956.142 |
| Aðrar rakstrarútreiðslur | 1.008.568 | 1.627.795 |
| | **4.058.448** | **5.772.027** |

| | 2019 kr. | 2018 kr. |
|---|---|---|
| **4. Starvsfólkakostnaðir** | | |
| Lønir | 2.822.806 | 3.127.783 |
| Eftirlønir | 141.053 | 102.152 |
| Onnur almenn gjøld | 151.747 | 144.028 |
| | **3.115.606** | **3.373.963** |

| | 2019 kr. | 2018 kr. |
|---|---|---|
| **5. Aðrir fíggjarligir kostnaðir** | | |
| Aðrir fíggjarligir kostnaðir | 35.604 | 48.085 |
| | **35.604** | **48.085** |

### 6. Materiell støðisogn

| | Grundøki og bygningar kr. | Annar útbúnaður, rakstrargøgn og innbúgv kr. |
|---|---|---|
| Útveganarvirði primo | 2.799.368 | 340.525 |
| Tilgongd | 183.931 | 105.785 |
| **Útvegnarvirði** | **2.983.299** | **446.310** |
| Av- og niðurskrivingar primo | 30.205 | 263.019 |
| Avskrivingar í árinum | 39.402 | 53.059 |
| **Av- og niðurskrivingar** | **69.607** | **316.078** |
| **Roknskaparligt virði** | **2.913.692** | **130.232** |

| | 31/12 2019 kr. | 31/12 2018 kr. |
|---|---|---|
| **7. Flutt úrslit** | | |
| Flutt úrslit primo | 4.615.898 | 2.767.250 |
| Fluttur vinningur ella hall í árinum | -160.926 | 1.848.647 |
| | **4.454.972** | **4.615.897** |
| **8. Onnur skuld** | | |
| Millumrokning Dana Cup | 0 | 51.806 |
| Millumrokning, kvinnur | 0 | 5.660 |
| Millumrokning, U16-dreingir | 0 | 22.171 |
| | **0** | **79.637** |

### 9. Veðsetingar og trygdarveitingar

Felagið hevur latið ognarveðbræv uppá tilsamans 15.000 t.kr., sum letur veð í grundøki og bygningi við roknskaparligum virði, tann 31. desember 2019 uppá 2.914 t.kr. Ognarveðbrævið er latið í varðveitslu sum trygd fyri aðrari langfreistaðari skuld, har restskuldin, 31. desember 2019 er 359 t.kr.

## Notur

| | | 2019 kr. | 2018 kr. |
|---|---|---|---|
| **10.** | **Javningar** | | |
| | Av- og niðurskrivingar av materiellari og immateriellari støðisogn | 92.461 | 68.252 |
| | Aðrar fíggjarligar inntøkur | -121 | -245 |
| | Aðrir fíggjarligir kostnaðir | 35.604 | 48.085 |
| | | **127.944** | **116.092** |

| | | 2019 kr. | 2018 kr. |
|---|---|---|---|
| **11.** | **Broyting í rakstrarpeningi** | | |
| | Broyting í áogn | -1.009.359 | 25.717 |
| | Broyting í vøru- og tænastuskuld og aðrari skuld | 617.986 | -268.634 |
| | | **-391.373** | **-242.917** |